# Leiga ein bil



Kunning og bilegging á tel. 31 35 35 ella á www.avis.fo

- Persónbilar í øllum støddum
- Vøruvognar
- 4x4 Pickup
- Minibussar til upp til 9 fólk
- Langtíðarleiga
- Tímaleiga
- Leiga uttanlanda

Johs. Berg
Staravegur 1-3
FO-100 Tórshavn
Tel.: +298 31 35 35
Mobil.: +298 21 75 35
Fax: +298 31 77 35
E-mail: avis@avis.fo

AVIS
We try harder.

www.avis.fo





1 vika í London
Bílegg á 34 10 10

# Pakkaferðir til London

**Fráferðir eru 18. og 25. juli**

**Fyri hvønn í tveymanskamari í 1 viku**

**6.985,-**

**Einakamar: Kr. 8.650,-**

Gist verður á fralíka 3★★★ Queen Park Hotel í Bayswater. Ikki langt frá Hyde Park og Oxford Street. Vælkendi Portobello Road leygardags-marknað-urin í Notting Hill Gate er bert fáar minuttir til gongu frá hotellinum.

www.queensparkhotel.com

**Íroknað ferðina er:**
Flúgving við Atlantic Airways Vagar - Stansted og aftur • Flutningur frá Stansted við bussi og aftur. Við hjálparfólki á staðnum • Gisting í 7 nætur á Queens Park Hotel við morgunmati • Halvdags útferð: London City Tour við skandinaviskum ferðaleiðara • Hálvdagsútferð: Hampton Court Palace & Gardens við skandinav-iskum ferðaleiðara • Ein av kendu West-End songleikunum, mánadag ella týsdag við flutningi til/frá hotellinum og skandinaviskum ferðaleiðara.

Ferðatrygging er ikki íroknað prísin.

**Fortreytin fyri ferðini er, at í minsta lagi 15 fólk tekna seg.**

Vanligir ferðaseðlar kunnu bíleggjast á atlantic.fo

ATLANTIC AIRWAYS
Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel: 34 10 10 · Faks 34 10 01 · booking@atlantic.fo

www.atlantic.fo

SANSIR 355 355



FRÍ Í FØROYUM *Finn friðin og frælsið í føroyskum fjøllum*

GAKK



TIL ALLAR BEINDOVNAR FØROYINGAR

Ikki rýma undan oyggjunum tá tær eru vakrastar!
Tak bilin av ræði og brúka beinini.
Stundin er komin.

***Miss fyri alt í verðini ikki hugin at ganga***
*Eg gangi mær hvønn dag vælveruna til,*
*og gangi frá hvørjari sjúku.*
*Eg havi gingið meg fram til bestu tankarnar,*
*og eg kenni ongan tanka, sum er so tungur,*
*at ein ikki kann ganga frá honum.*
*(-Søren Kirkegaard)*

Ferðaráð Føroya

Suðuroyar Kunningarstova á Tvøroyri tel 37 24 80, Suðuroyar Kunningarstova í Vági tel 37 43 42,
Sandoyar Kunningarstova tel 36 18 36, Kunningarstovan tel 31 57 88, Aldan tel 35 58 00, Kunningarstovan í Saltangará tel 44 94 49,
Kunningarstovan í Fuglafirði tel 44 48 60, Vága Kunningarstova tel 33 34 55, Norðoya Kunningarstova tel 45 69 39

www.visit-faroeislands.com

LOYSNIR 32 21 23




# Ampaljóð





SprenRex er komið á marknaðin við síni fyrstu útgávu, og tað er undirgrunds rokk-fløgan Ampaljóð. Á fløguni eru fýra bólkar, ið framføra 2-3 løg í part og hesir bólkarnir eru: Zink, 48 Pages, Speaker og Lama Sea. Stílurin á tónleikinum er sostatt rættiliga fjølbroyttur, men alt liggur so at siga í tí harða endanum. Fløgan er upptikin í Hystereo Studio í ART-hølunum í Havn og maðurin aftan fyri hettar er Karl Anton Klein. Hann sigur um fløguna; "Hetta er tann týdnignarmiklasta fløgan at ogna sær síðan "Eg eri ein K" og at fløgan er eitt absolutt "Must!""

Karl Anton Klein er væl nøgdur við nýggja verk sítt og sær fram til eitt nýtt spren produkt í nærmastu framtíð. Ampaljóð er ein live undirgrunds fløga t.v.s., at øll løgini eru spæld beint fram inn á ein harddisk recordara. So tað er ikki ein fín popp fløga vit tosa um, men ein live, rá, full power rokk fløga. Av tí góða slagnum væl at merkja.

**Ljóðbland, mastering og framleiðsla**

Bloch er maðurin, sum gjørdi arbeiðið liðugt við at ljóðblanda og mastra fløguna. Meiningin var at geva løgunum eitt heitt ljóð, men tó ikki fór flott. Arbeiðið eydnaðist sera væl og síðani fór fløgan til framleiðslu hjá SonoPress í Týsklandi.

**Raðfylgja**

1. Zink - See U
2. 48 Pages - Goin' Solo
3. Speaker - Evil Dead
4. Lama Sea - Speading All My Love
5. Speaker - Between Us
6. Zink - Kiss You
7. 48 Pages - Wet Cream
8. Lama Sea - Young Love
9. Zink - Barbara C.
10. 48 Pages - Me And My Boyfriend (Feat. The KAK)

**Fløgan Ampaljóð verður at fáa 19. juni á ROX 2004 og í handlunum frá 21. juni. Fløgan kostar 100 kr.**

*Lesið lýsing av bólkunum á s. 6–7*

# Spren Rex

Útgávufelagið Spren Rex varð stovnað við tí fyri eyga at standa fyri útgávuni "Ampaljóð", ið er ein savnsfløga við teimum fýra undirgrundsbólkunum, Speaker, 48 Pages, Zink og Lama Sea.

Allir bólkarnir hava meir ella minni samband við tað sera virkna ART umhvørvið á Margarinfabrikkini í Tórshavn.

Stigtakaranir, limir í bólkunum 48 Pages og Speaker saman við Karl Anton Klein, settu ferð á tiltakið í tí sannroynd at lítið og onki hevur verið gjørt við og fyri tann partin av tónleikapallinum, ið spælir eitt sindur harðari tónleik enn dansitónleik, og tí var hildið at stundin var komin at royna við eini útgávu sum peikar frameftir og flytir stoppskeltini burtur, so at siga, slóðar fyri øðrum sum fegin vilja royna seg.

Tað eru fleiri tónlistarlig stop skelti enn koyr á head skeltir í Føroyum.

## SPREN REX STENDUR FYRI:

1. FRÆLSIÐ AT SPÆLA ALLAN TÓNLEIK, ÓSENSURERAÐAN.
2. FRÆLSIÐ AT LURTA EFTIR ØLLUM TÓNLEIKI. SJÁLVT UM HANN LJÓÐAR ILLA.
3. AT FØROYSKUR TÓNLEIKUR SKAL VERA SO ÓDÝRUR AT UNGDÓMINUM IKKI TØRVAR AT BRENNA HANN OG HARVIÐ GERAST KRIMINELLUR OG KUNNA FÁA STÓRA BÓT FYRI SÍTT VIKSEMIÐ.
4. AT TAÐ SKAL VERA LÍKA LÆTT OG NÆSTAN LÍKA BÍLIGT AT KEYPA EINA FLØGU SUM AT KEYPA EINA COCA COLA.
5. ER EIN OPIN LEIKPALLUR.

# ROX og Margarinfabrikkin

Margarinfabrikkin virkishús fyri børn og ung, bakkar fult upp um ársins tónleikatiltak ROX 2004 í Badmintonhøllini.

Seinastu árini hevur Margarinfabrikkin verið kanska einasti opni alternativi pallur fyri yngru tónleikabólkarnar í Havn. Við jøvnum millumbili hava konsertir verið, har nýggjur tónleikur, alt frá heavy til techno, hevur verið fram-førdur. Allir bólkarnir á konsertini hava tætt tilknýti til Margarinfabrikkina og summir eru so at siga uppvaksnir har.

So sigast kann, at hetta er eitt natúrligt framhald av tónleikavirkseminum, sum nú verður flutt niðan í Gundadal.